# Háárstíð í vakstarhúsinum í Sandavági



**Kári á Lofti hevur seinastu 30 árini hjúkla um vakstrarhúsið hjá sær í Sandavági: - Tað er kærleikin til blómurnar og runnarnar, ið drívur verkið, greiðir hann glaður frá**

VESTANSTEVNA
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Dagliga arbeiða tríggjar kvinnur saman við Kára á Lofti í vakstrarhúsinum. Men Kári á Lofti dámar væl at arbeiða millum kvinnurnar:

- Tað ber kanska til at siga, at vakstrarhúsið er ein handil til kvinnur, tí nógv tey flestu viðskiftafólkini eru kvinnur. Men tað ger als einki, sigur Kári á Lofti og leggur afturat, at í heilum koma útlendingar og keypa sær blómur við sær aftur til húsa:

- Tað er nokkso stuttligt. Í vikuni kom ein stórur bussur fullur av ferðandi úr Íslandi á gátt. Tey keyptu prýðislutir, men somuleiðis plantur.

Í vakstrarhúsinum gongur tað í løtuni væl við søluni:

- Um summarið selja vit altíð nógv. Vit hava um tíggju sløg av summarblómum, og blómurnar, sum selja best, eru uttan iva margerittur og fjallablákollur, sigur Kári á Lofti at enda.

*Í løtuni eru hølini á tremur við summarblómum, men longu í august fara jólastjørnurnar at fylla borðini í vakstrarhúsinum í Sandavági.*

Malan á Lofti:

## – Fingið íblástur frá vakstrarhúsinum

**Vakstrarhúsið í Sandavági er ein sonn familjufyritøka. Seinastu 30 árini hevur Kári á Loftistaðið á odda fyri vakstrarhúsinum, og børn hansara hava somuleiðis slitið barnaskógvarnar millum blómurnar og runnarnar í vakstrarhúsinum. Sniðgevin, Malan á Lofti, er ein teirra**



VESTANSTEVNA
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

– Tá eg og systkin míni vóru lítil var eingin barnagarður í bygdini, og tí gingu vit bara í vakstrarhúsinum og hugnaðu okkum. Og tað hevur heilt víst givið okkum íblástur til okkara yrkisleið. Vit eru øll nokkso skapandi, og vakstarhúsið er orsøkin til tess, sigur Malan á Lofti, sum gjørdist sniðgevi í 2002.

Dagliga arbeiðir hon við at gera klæðir úr seyðaskinni. Í Danmark hevur Malan sína egnu fyritøku, ið selur klæðir til Týsklands, Hollands, Onglands, Amerika og Føroya. Og fyri kortum hevði hon eina framsýning á Bryggjuni í Keypmannahavn, sum eydnaðist væl. Næst á skránni hjá Maluni er ein spildurnýggj vørusending við klæðum einans úr seyðaskinni.

## Mikil stákan til vestanstevnu



Tá summarið er í hæddini, plagar Tóra í Horni altíð at keypa sær blómur í vakstrarhúsinum í Sandavági. Og nú vestanstevna er í nánd, fer Tóra at prýða havan hjá sær:

– Tá vestanstevna er í Sandavági, stákast øll bygdin í fleiri dagar. Vit baka, mála, hjúkla um havan og rudda alla bygdina. Í dag havi eg keypt mær blómur, sum eg fari at seta í havan, tá eg komi heim. Rætt og slætt gera vit øll nógv burtur úr havnunum hjá okkum í Sandavági, men tað kemst helst eisini av, at vit hava eitt vakstrarhús í bygdini, sigur ein fegin Tóra.

**- horsdal**